

# Lektari og adjunktur í løgfrøði

## 2 størv á Fróðskaparsetrinum

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt nýtt lektarastarv í løgfrøði og eitt nýtt starv sum adjunktur í løgfrøði leys at søkja.

**Starvsøki**
Umframt at taka sær av undirvísing í grundskeiði í lóg skulu bæði lektarin og adjunkturin fyrireika og leggja til rættis eina komandi masterútbúgving í lóg og fremja gransking í lóg. Granskingarparturin hjá lektaranum verður tá fyrstu tíðina tengdur at sernámi hansara, men væntað verður, at granskingarøkið verður breiðkað, sum frá líður, og at lektarin rættiliga skjótt skapar møguleika fyri at knýta Ph.D.studentar í løgfrøði at deildini.

Adjunktstarvið er eitt útbúgvingarstarv sett fyri 4 ár, soleiðis at adjunkturin eftir í mesta lagi 4 árum vinnur sær neyðugan granskingar- og undirvísingarførleika og tá kann lektarametast og, um úrslitið verður positivt, setast í fast starv sum lektari.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin til lektarastarvið skal umframt kandidatútbúgving í løgfrøði hava granskaraútbúgving í løgfrøði á Ph.D.stigi og hava royndir sum granskari. Lektarin skal hava undirvísingarroyndir og skal duga at samskifta mælt á føroyskum, enskum og norðurlendskum. Lektarin skal hava førleika til at knýta netverk og samstarva við onnur universitet.

Adjunkturin skal hava kandidatútbúgving ella samsvarandi í løgfrøði, hava ávísar granskingarroyndir, og um viðkomandi ikki hevur longu hevur ella er komin ávegis við Ph.D.lestri, skal hann ella hon láta seg innskriva til Ph.D.lestur í løgfrøði. Harumframt skal adjunkturin hava somu almennu førleikar sum lektarin.

Til at meta millum umsøkjararnar verður sett ein sakkøn metingarnevnd mannað við trimum fólkum. Av hesum skal eitt fólk hava góðan kunnleika til løgfrøði í Føroyum.

Størvini verða bert sett, um neyðug játtan fæst.

**Umsóknir**
við ævilýsing, próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, vísindaligum greinum, ritgerðum og bókum í trimum eintøkum skulu verða Fróðskaparsetrinum í hendi áðrenn 6. juni 2008. Viðmerkt skal verða, hvat av størvunum søkt verður.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, tel 352585, *elinsj@setur.fo* ella til rektaran Jóan Paula Joensen, tel 352585 ella 552503 *jopajo@setur.fo*

**Umsóknir skulu sendast til:**

Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøta 14 · Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn

Søgu- og samfelagsdeildin heldur til í nýistandsettum húsum í Jónas Bronckgøtu 25 saman við Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya.

Undirvísingarhøli, bókasavn, verkstova og kantina eru felags.

# Starvsfólk til Barnaverndartænastuna

**Fyri: Sørvágs,- Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur**

Við hesum verður søkt eftir starvsfólki til Barnaverndartænastuna fyri Sørvágs-, Miðvágs-, Sandavágs-, Kvívíkar- og Vestmanna kommunur til setan skjótast gjørligt.

Talan er um farloyvisstarv fulla tíð frá 01.08.08 til 31.01.09 við møguleika fyri leingjan.

Barnaverndartænastan heldur til á kommunuskrivstovuni í Sandavági og nakað av ferðing má roknast í starvinum.

**Arbeiðsøki:**
Arbeiði er fjølbroytt og umfatar, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði, m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og seta stuðlar í starv.

Arbeiðið umfatar somuleiðis samskifti og tvørfakligt samstarv við skúlar, dagstovnar/dagrøktir, læknar, heilsurøktarfrøðingar, løgreglu, almennar stovnar o.o.

**Vit vænta av tær:**
- At tú hevur hóskandi útbúgving, t.d. sosialráðgevi.
- At tú hevur arbeiðsroyndir innan málsviðgerð í almennari umsiting og/ella hevur royndir frá barnaverndararbeiði.
- At tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiðnum.
- At tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.
- At tú hevur góðan telduførleika
- At tú hevur góðan kunnleika í føroyskum máli.

**Løn:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Umsókn:**
Hevur starvið tín áhuga, send so skrivliga umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til Barnaverndartænastuna, Postrúm 19, 360 Sandavágur.

Umsóknin skal verða Barnaverndartænastuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 09. juni 2008 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jónley Poulsen á telefon 333 960 ella 213 960.

Barnaverndartænastan tilskilar sær rættin til at søkja av nýggjum, um ikki nóg nógvar umsóknir eru til starvið.

**Barnaverndartænastan**

# OV STÓR HÚS??

Tað er kanska strævið hjá tær at halda húsini og tú umhugsar kanska at býta um við eina minni íbúð, sum er nógv bíligari í el og hita og hartil einki viðlíkahald.

Eigur tú, ella tit, eini hús í Havn ella Suður Streymoy, kunnu vit kanska taka eitt prát um, hvussu nógv vit evt. skulu gjalda ímillum.

Vit hava eina góða íbúð á Ternuryggi í Havn, ca. 70 m², stova og køkur í einum og 2 kømur.

Hevur hetta áhuga, vinarliga sendi okkum nakrar reglur.

**Bill. Mrk. 0197**

# Bátar til einhvønn tørv



m.a. hendan Antioche 700
7,00 x 2,75 m v/120 hk. Volvo
Báturin er á goymslu
Vælkomin at geva boð.

Vælkomin at ringja 219450 ella senda ein t-post til hpe@kallnet.fo

**SP/F RÚNAR**
Túnagøta 1 · 600 Saltangará
tlf. 219450 · fax 449191 · hpe@kallnet.fo

# Køkurin er opin

**hvønn gerandisdag til kl. 22.30 og í vikuskiftinum til kl. 23.00.**

RIO BRAVO RESTAURANT

Tórsgøta 11
Tel. 31 97 67
www.riobravo.fo

# SÓKT VERÐUR EFTIR BUSSFØRARA

AT KOYRA Á LEIÐ 101 OG 300.
VIT KUNNU BJÓÐA GÓÐA LØN OG NÓGVA FRÍTÍÐ.

ÁHUGAÐI KUNNU RINGJA 58 90 11